Hátrýst yvir Føroyum

Lágtrýstini standa alsamt í bíðirød vestan fyri Føroyar. Kortini hevur tað eydnast einum einsamøllum hátrýsti at trokað seg framum. Tað er 500 bar og hægsta hátrýst, ið hevur verið her um leiðir. Hetta hátrýst verður verandi, og endamálið er eittans: At beina burtur leysa máling, skitt og aðra óhumsku. Vilt tú hava skitt ella leysa máling av vegginum ella takinum, er at taka telefonina og trýsta 42 31 11. So koma vit á staðið við okkara rullandi hátrýsti!

Ring 42 31 11

SANDBLÁSING
VEGGJAREINSAN & TAKREINSAN

Spf. Sandblásing · 466 Ljósá · Telefaks 42 34 32 · sandblas@post.olivant.fo

Rækjuflotin hevur velduga stóran fíggingartørv

– Tað er ikki hugsandi, at vit fara at stuðla vinnuni aftur við beinleiðis stuðli, men spurningurin er, hvussu vit í aðrar mátar kunnu stuðla rækjuflotanum við samráðingum, sum kunnu geva flotanum øktar møguleikar og betri umstøður, sigur Jacob Vestergaard

RÆKJUFLOTIN
Vilmund Jacobsen

Í Sosialinum herfyri vísti Bjarni Petersen, skipari á rækjutrolaranum, Arctic Viking, á, at ein gongd leið burtur úr truplu støðuni hjá rækjuflotanum hevði verið, at skipini sluppu undir eina FAS-líknandi skipan. Hann helt ikki, at hetta átti at verið so trupult, tá ið vit frammanundan hava eina slíka skipan fyri farmaskipini.

– Rækjuflotin fiskar ikki – eins og onnur langfaraskip – av kvotum, sum verða rindaðar við fiski undan Føroyum, men av kvotum, ið flotin sjálvur gjøgnum árini hevur útvegað sær søgulig rættindi til.

Bjarni Petersen helt, at nú rækjuflotin stendur til at fara fyri bakka, hevði ein FAS-líknandi skipan bøtt munandi um støðuna.

– Bert tvey rækjuskip høvdu líkinda úrslit í fjør og hóraðu so nøkulunda. Øll hini høvdu hall. Soleiðis, sum støðan er nú, gongur tað niður á bakka hjá øllum rækjuflotanum, sigur landsstýrismaðurin, sum tó ikki vil geva lyfti um nakran beinleiðis stuðul úr landskassanum

Eingin bjarging

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur, at hann er vitandi um truplu støðuna hjá rækjuskipaflotanum, men at ongar ítøkiligar ætlanir eru frá almennari síðu um at taka hond um hendan partin av flotanum.

– Tað er ikki hugsandi, at vit aftur fara at stuðla vinnuni við beinleiðis stuðli, men spurningurin er, hvussu vit í aðrar mátar kunnu stuðla rækjuflotanum við samráðingum, sum kunnu geva flotanum øktar møguleikar og betri umstøður.

Landsstýrismaðurin er eisini vitandi um argumentið, at rækjuskipini ikki veiða av kvotum, sum verða rindaðar við fiski undan Føroyum.

– Vit fylgja við, hvussu gongdin er, og í hesum sambandi hava vit havt fundir við umboð fyri rækjuvinnuna og grannskoðarar hjá reiðariunum. Tøl eru sett upp, og tosað hevur verið aftur og fram um, hvørjir møguleikar eru.

Jacob heldur tó ikki, at ein FAS-líknandi skipan kann hjálpa rækjuskipaflotanum burtur úr kreppuni, tí soleiðis, sum støðan er, munar ein tílík skipan ov lítið.

– Ein FAS-líknandi skipan ger lítlan og ongan mun hjá fleiri av skipunum, sigur hann.

– Ein FAS-líknandi skipan, sum rækjumenn hava skotið upp, hevði lítlan og ongan mun gjørt, tí fíggingartørvurin hjá rækjuvinnuni er so velduga stórur, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Veldugur tørvur

Landsstýrismaðurin sigur, at fíggingartørvurin hjá rækjuskipaflotanum er velduga stórur og táttar upp ímóti 100 milj. krónum.

– Vit hava skilt, at bert tvey skip høvdu líkinda úrslit í fjør og hóraðu so nøkunlunda. Øll hini høvdu hall.

Jacob sigur, at fleiri rækjuskip standa í nógvum peningi, og soleiðis sum støðan er nú, gongur tað niður á bakka hjá teimum øllum.

– Eigarar av rækjuskipum ringja av og á og spyrja, hvussu vorðið er – og um landsstýrið ætlar at taka nøkur stig, men sum eg nevndi, fyriliggur eingin ítøkilig ætlan um at stuðla flotanum beinleiðis, sigur hann.

Jacob vísir á, at løgtingið júst hevur heitt á landsstýrismannin um at seta eina skjóttarbeiðandi nevnd at viðgera langfaraflotan og herundir eisini rækjuskipaflotan.

– Mín sannføring er tó, at einki er bara hvítt ella svart. Tí haldi eg ikki, at tað – uppá forhond – er rætt at siga, at tað als ikki kann koma uppá tal at hjálpa rækjuskipaflotanum burtur úr kreppuni, nú útlitin hjá flotanum eru so sera vánalig.

Oysa á marknaðin

Landsstýrismaðurin sigur, at kanska fer tað at hjálpa flotanum eitt sindur, um oljuprísurin, soleiðis sum útlitini eru, fellur.

– Hinvegin vísir tað seg, at tá ið prísurin á rækjunum fellur, oysa kanadiumenn og grønlendingar bara fleiri rækjur inn á marknaðin, og tað gongur so aftur útyvir prísirnar, sum okkara skip fáa, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard.

Í blaðnum herfyri segði Bjarni Petersen, at manningarhýrurnar umborð á føroysku rækjuskipunum eru nógv hægri enn umborð á teimum skipum, vit kappast við.

Løgmaður stóð fyri skotum

Lógir eru settar í verk uttan tingsins samtykki. Og tað vil løgtingið ikki finna seg í. So mikið var semja um í løgtinginum hósdagin. Men orðaskifti fór eisini at snúgva seg um, hvørt løgmaður visti, hvat danska stjórnin hevði í kvittanum. Løgmaður ger hinvegin púra greitt, at hann onga tilsøgn hevur givið til at seta lógirnar í verk

HERNAÐARLÓGIR
Ingi Rasmussen

Løgtingsmenn taka tað í sera stórum álvara, at danska stjórnin hevur sett ein bunka av lógum og kunngerðum í gildi fyri Føroyar, uttan at spyrja løgtingið eftir.

Tað varð staðfest, tá løgtingið hósdagin seinnapart viðgjørdi uppskot til ríkislógartilmæli hjá Javnaðarflokkinum um at avtaka hernaðarligu revsilógirnar v.m., sum ríkisumboðið hevur lýst í kunngerðarblaðnum uttan at spyrja føroyingar eftir. Tað hevur annars verið vanlig mannagongd, síðan heimastýrislógin kom í gildi fyri 55 árum síðan. Talan er um einar 30 lógir og kunngerðir, ið stava líka frá 1940 fram til í dag.

Løgtingið vil hava lógirnar tiknar av aftur við brestin og krevur, at tað verður spurt eftir og gevur sína samtykt, áðrenn ríkislógir verða settar í verk frameftir.

Løgmaður visti

So mikið var semja um. Men á løgtingsfundinum hósdagin kom eisini fram, at landsstýrið var kanska ikki so óvitandi, sum tað letst at vera. Í øllum førum løgmaður er kunnaður um, at danska verjumálaráðið ynskti hernaðarlóggávuna fyri Føroyar dagførda.

Í tveimum brøvum frá 25. og 30. juli 2002 frá danska verjumálaráðharranum Svend Aage Jensby sæst, at løgmaður er kunnaður um, at danska stjórnin vildi hava lógirnar settar í verk. Og talan er um júst tær hernaðarligu revsilógirnar v.m., sum stríð nú stendst av. Hetta brúkti serliga Sambandsflokkurin men eisini Javnaðarflokkurin nógva tíð til í løgtinginum.

– Sambandsflokkurin vil hava, at allar ríkislógir skulu fyri løgtingið til støðutakan, áðrenn tær vera settar í gildi. Og um løgtingið ikki samtykkir tær, skulu tær ikki setast í verk. Lat tað vera púra greitt. Men onkur skal bera lógirnar í tingið, og vit kunnu bara staðfesta, at onkur í landsstýrinum hevur ligið á hesum málinum í eitt heilt ár, og tað undrar meg, sigur Heðin Mortensen, tingmaður.

Onki viðmæli

Løgmaður skar tingini út í papp, tá hann svaraði ákærunum aftur. Talan var um eina einvegis ígildissetan frá danskari síðu, slerdi hann fast.

– Løgmaður hevur hvørki munnliga ella skrivliga mótvegis donsku stjórnini givið tilsøgn um at seta hesar lógir í gildi, segði Anfinn Kallsberg.

Løgmaður greiddi frá, at orsøkin til, at hann ikki hevði brúkt stórvegis orku upp á hesar lógirnar, hóast hann fekk bræv um tær, var, at løgtingið longu hevði samtykt 26. november 2001, at hernaðaligu revsilógirnar skuldu takast av, og at Føroyum ongar lógir nýttist á økinum.

– Løgtingið hevur tikið stoðu til, at vit ikki ynskja lóggávu á hesaum økinum. Og tí eru absolutt eingi stig tikin til at viðgera hetta málið meira í Tinganesi. Hetta er eitt mál, sum løgtingið ikki ynskir, hví so brúka orku upp á tað? spurdi Anfinn Kallsberg.